# ALTERNATIV ÓLAVSØKURØÐA 2010

ÁGANGURIN Á **HAVNINA** ER MANGAN **ØGILIGUR**. HETTA SIGUR OKKUM FYRST OG FREMST, AT VIT ALS IKKI HAVA SKILT **BOÐSKAPIN** UM, AT TÁ **HAVNIN** HEVUR TAÐ **GOTT**, HEVUR RESTIN AV **FØROYUM** TAÐ GOTT. ER IKKI **FRAMGONGD** OG VØKSTUR Í HAVNINI, SO ER **AFTURGONGD** Í FØROYUM, SIGUR **HEÐIN MORTENSEN**, BORGARSTJÓRI Í **TÓRSHAVNAR KOMMUNU** MILLUM ANNAÐ Í HESI ALTERNATIVU **ÓLAVSØKURØÐUNI**

**Heðin Mortensen**



MYND: ÓLAVUR FREDERIKSEN

Einhvør staður er heimsins nalvi fyri tey, sum búgva og liva har, hevur onkur sagt. Fyri okkum, sum búgva í Havn, er Havnin sjálvandi heimsins nalvi. William Heinesen kallaði eisini Havnina heimsins nalva, men legði aftrat, at Havnin var »*den største by i mange hundrede kilometers omkreds*«. Og tað gevur ikki bara fyrimunir, men áleggur býnum stórar skyldur. Longu í landnámstíðini gjørdist Havnin savningarstaður, har føroyingar hittust. Havnin er miðdepil og tí vælegnað sum miðstaður. Havnin menti seg til ein lítlan metropol og hevur verið høvuðsstaður føroyinga við teimum skyldum, tað leggur á eina í heimshøpi lítla kommunu. Soleiðis hava vit livað nøkurlunda eydnusæl í hesum hugnaliga mikrokosmos, so fegin hava vit lagt okkum í hennara favn, syngjandi um ta deiligu Havn.

Men Adam var ikki leingi í paradís. Og svøvnur okkara varð ikki drúgvur, tí áhaldandi verða vit vakt av lammeterilsi og støðugt mint á, at »Tórshavn er ***ikki*** heimsins nalvi, og jørðin og útjaðarin mala ikki runt um Havnina«. Snimma og seint verða vit mint á, at Havnin skal ikki halda seg vera, skal ikki hava sersømdir, at vit draga alt til Havnar, vit avoyða bygdirnar, tí vit drena bygdirnar fyri ungdóm og kradda allar almennar stovnar til okkara. Seinasta dømi um hetta er, at vit nú leggja allan skúlaskap og harvið allan ungdóminum í landinum undir okkum.

Veruleikin, at landsmyndugleikarnir seinastu minst 20 árini støðugt og miðvíst hava útbygt alt miðnámsskúlaøkið allastaðni ***uttan*** í Havn: Miðnámsskúladepil í Hovi fyri 100 milliónir, Fiskivinnuskúla í Vestmanna fyri 50 milliónir, studentaskúla og handilsskúla á Kambsdali, fleiri milliónaútbyggingar á tekniska skúlanum í Klaksvík og játtanir til sjómansskúlan í Klaksvík – alt hetta hava vit fingið, meðan slummið í Hoydølum er vorðið ólekrari og útbúgvingarpolitiska skommin fullkomin. Men hetta hevur ongan áhuga fyri hesi, sum nú stara seg blind upp á Skúladepilin í Marknagili.

## Veruleikin um Skúladepilin

Havnin er ikki bara fyri »havnarfólk«. Men landsins høvuðsstaður er fyri allar føroyingar, og skúladepilin í Marknagili er ikki ein íløga í miðstaðarøkið, men ein íløga í landsins ungdóm og landsins framtíð.

Mikkjal Helmsdal, rektari í Hoydølum, staðfesti herfyri, at »*í Havn og í Suðurstreymoy hevur eingin nýbygging á miðnámsskúlaøkinum verið í 25 ár, samstundis sum verandi miðnámsskúlar í Havn umboða yvir 60% av miðnámsskúlanæmingunum í øllum landinum, so tað ber ikki til at siga, at miðnámsskúladepilin seinkar nýbygging á miðnámsskúlaøkinum. Tað er rætt og slætt eingin onnur verkætlan á miðnámsskúlaøkinum, sum hevur størri týdning og er meira átrokandi enn henda.*«

Skúlastjórin á Tekniska Skúla, Egon Øregaard, segði eisini herfyri, at »*persónliga taki eg fult undir við Skúladepilshugtakinum, og havi frá byrjan sæð stórar møguleikar við einum Skúladepli. Skúladepilin kemur at skapa bestu fortreytir fyri at okkara ungu fáa eina góða og viðkomandi útbúgving í Føroyum, og at teirra náttúrligi áhugi verður vaktur á fleiri økjum. Skúladepilin kemur eisini at geva teimum lesandi eina fatan av, hvussu eitt nútíðar undirvísingarumhvørvi er, eisini í okkara grannalondum. Sjálvur síggi eg møguleikar fyri, at Skúladepilin gerst ein fólksligur mentanardepil.*«

Eingin ivi kann vera um, at depilin útbúgvingarliga er eitt stórt framstig, og eitt stórt framstig fyri at fáa sum flest av okkara ungu at nema sær útbúgving eftir fólkaskúlan – í Føroyum. Íløga í vitan er altavgerandi fyri okkara framtíð. Og her eru vit við kjarnuna í málinum, sum onkur annar eisini hevur víst á, at alternativið til Skúladepilin er, at ungdómurin fer í miðnámsskúla í Danmark ella aðrastaðir – og ongantíð kemur aftur.

## Havnin sum høvuðsstaður

Tað kann ikki koma nøkrum dátt við, at tað krevst ein stór umsiting til at reka